# Skal lutast sundur í smábitar og býtast ímillum nakrar fáar hendur



*– Tað kunnu vera góðar orsøkir til at privatisera Fiskavirking, men tað eru líka góðar grundir til at vísa størsta varsemi, helt Atli Dam á landsfundi í javnaðarflokkinum um vikuskifti*

**– Tað, sum liggur aftan fyri teir fáfongdu dreymarnar um ein føroyskan virðisbrævamarknað, er, at almennar fyritøkur skulu lutast í smábitar og býtast ímillum nakrar fáar hendur, sigur Atli Dam**

PRIVATISERINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað kann væl vera, at tað eru nógvar góðar grundgevingar fyri at privatisera Fiskavirking. Men tað eru líka nógvar góðar grundir til at vera ógvuliga varðin.

Tað segði Atli Dam, tá ið hann gav sítt íkast til kjakið um privatisering á landsfundinum í javnaðarflokkinum.

Atli Dam er av okkara drúgvastu politikarum og hann ivaðist ikki í, at tað, sum fór fram í løtuni, var ein fjald ætlan, sum hevði til endamáls at luta Fiskavirking sundur í smábitar og at býta hana ímillum nakrar fáar hendur.

– Tað er eisini júst hetta, sum liggur aftanfyri teir fáfongdu dreymarnar um ein føroyskan virðisbrævamarknað, segði Atli Dam.

– Ein føroyskur peningamarknaður hevur ikki ein livandi kans at standa seg, segði hann.

Eitt nú nevndi hann, at danski fondsbørsurin var ov litil.

– Og nú seta føroyingar eitt heilt apparat á føtur, saman við íslendingum, við tí fyri eyga at luta almennar fyritøkur sundur.

Annars helt hann, at í grundini var Fiskavirking var ein eftirgerð at gomlu skipanini, tá ið Fiskasølan hevði alt at siga.

– Og ein slík skipan kann ikki halda fram í allar ævir, segði Atli Dam.

– Men tá ið broytingar verða gjørdar, skulu vit vera vís í, at tað, sum verður gjørd, er rætt og rættvíst og kemur heildini og samfelagnum sum heild, til góðar. Tí er tað rætt at bíða, og at vísa varsemi, so at vit vita, hvat vit gera.

– Og eg dugi ikki at síggja nakað rættvíst í, at tey virði, sum tað almenna hevur bygt upp, nú skulu pivatiserast uttan víðari.

### Gongur ímóti privatiseringum

Kortini er tað so, at gongdin er fram ímóti privatisering og tað eigur eisini javnaðarflokkurin at taka til sín, tí í summum førum kann tak verða gagnligt.

Atli Dam helt, at skal tað privatiserast, eigur tað at vera ein fortreyt, at tað førir kapital til virkini, men at arbeiða eftir leistinum, sum nú er stungin út í kortið, har endamálið er at geva nøkrum fáum einstaklingum nøkur pappír at seta pening í, skapar onki.

Men hann helt, at javnaðarflokkurin var inni á tí rætta, tá ið hann mælti til at byrja varliga til at býta ímillum fólk til fólkaogn.

– Eru nógvir partaeigarar í Føroya Banka, hevur tað tann fyrimunin, at nakrir fáir partaeigarar kunnu ikki gera, sum teir vilja í tráðanini eftir vinningi, tí tann tráðanin er oftast stuttskygd.

Hann vísti á, at ein stovnur, sum talan hevði verið um at privatisera, var realurin, har hann sjálvur var stjóri. men verður tað hjørt, ivaðist hann ikki í, at rentan av lánum til fiskivinnuna fór at hækka nøkur prosent.

# Vilhelm Johannesen takkar fyri seg

**Eftir at hava sitið í starvsnevndini í javnaðarflokkinum í 31 ár, hevur hann nú tikið seg úr**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Heðin Klein er nýggjur maður í starvsnevndini hjá javnaðarflokkinum, eftir at Vilhelm Johannesen hevur tikið seg úr*

Vilhelm Johannesen er ikki longur limur í starvsnevndini í Javnaðarflokkinum.

Og tað verður eitt sindur av eini broyting, tí hann hevur sitið í starvsnevndini síðani í 1972, tvs í heili 31 ár.

Og hetta er tað longsta, nakar hevur sitið, uttan møguliga Petur Mohr Dam.

Á landsfundinum í Hvalba um vikuskiftið gjørdi hann greitt, at hann stillaði ikki uppaftur til lim í starvsnevndini.

Hann helt, at nú hevði hann sitið so leingi, at hann hevði hug at lata aðrar kreftir koma framat

Í hansara stað var ein annar klaksvíkingur, Heðin Klein, valdur í starvsnevndina.

Annars hendi ongin broyting í starvsnevndini og hon er sostatt soleiðis mannað nú:

Jóannes Eidesgaard er formaður, næstformenn er Jancy Olsen av Toftum og Bergur Dam í Havn. Skrivari er Hans Pauli Strøm í Vestmanna.

Nevndarlimir eru Katrin Dahl Jakobsen, Kristoffur Gaardlykke í Miðvági, sum eisini er formaður í SU, sum er ungmannafelagið hjá flokkinum, og Heðin Klein úr Klaksvík.

Ì floksleiðsluni annars sita løgtingslimir floksins, umframt umboð fyri tey ymsu økisfeløgini.

Annars er avgjørt at gera floksleiðslufundirnar meiri opnar, so at allir nevndarlimir í økisfeløgunum hava atgongd við talurætti, men ikki atkvøðurætti.

### Skriva bók

Jóannes Eidesgaard takkaði Vilhelm Johannesen fyri trúgva tænastu í starvsnevndini.

Men hann ætlaði ikki at sleppa Vilhelm so.

Hann vísti á, at í 2005 er javnaðarflokkurin 80 ár og hann róði framundir at fáa onkran at skriva søguna hjá flokkinum í bók.

Hann helt, at at skal flokssøgan skrivast, er hetta í tøkum tíma, tí skjótt eru allir teir farnir, sum minnast ta fyrstu tíðina.

Og hann helt, at Vilhelm Johannesen er eitt sjálvsagt boð uppá, hvør skuldi skriva hesa flokssøguna, tí fáur hevði verið við so leingi sum hjúst Vilhelm og at hann hevur ein leikandi lættan penn, er postsøgan, sum hann hevur skrivað, besta prógvið um.

Vilhelm Johannesen lovaði at umhugsa tað, men hann vildi helst havt onkran afturat sær.

Á landsfundi hjá javnaðarflokkinum:

# Fiskavirking privatiserast sum skjótast

**Á Landsfundi hjá javnaðarflokkinum hetta vikuskiftið fekk Dan Petersen, sum hevur verið løgtingsmaður, rættiliga gongd á orðaskiftið, tá ið hann mælti flokkinum til at privatisera Fiskavirking sum skjótast**

PRIVATISERING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er rættiliga illa dámt ímillum fiskimenn, at teir skulu betala prísin fyri at varðveita Norrønu í flotanum, sigur Dan Petersen. Hann heldur, at júst Norrøne er ein orsøk til, at javnaðarflokkurin ikki vil privatisera Fiskavirking*

– Fiskavirking eigur at verða privatiserað sum skjótast.

Hetta hava vit hoyrt fyrr.

Men í hjartanum á Føroya javnaðarflokki, eru hetta nýggir tónar.

Á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum í Hvalba kom fram, at flokkurin er ikki fullsamdur um, hvørja lagnu Føroya Fiskavirking eigur at fáa.

Vanliga hugsanin hevur verið, at javnaðarflokkurin er ikki so heitur fyri at privatiserað Føroya Fiskavirking.

Men ein, sum ikki er samdur við hesum er Dan Petersen, sum hevur verið løgtingsmaður fyri flokkin.

Á landsfundinum mælti hann til at Fiskavirking verður privatiserað.

Hann helt ikki, at tað var modernaður, sosialdemokratiskur politikkur nakrastaðni í Vesturevropa, at tað almenna skuldi eiga 40% av høvuðsframleiðsluni í einum landi.

Hann vísti á, at Fiskavirking var ein kreppuloysn og at Thomas Arabo, sum var landsstýrismaður fyri javnaðarflokkin, hevði lagt doyðin á, at tað skuldi upploysast aftur, tá íð tíðirnar broyttust..

### Betongkommunisma

– Fiskavirking er betongkommunisma. Tað stendur fyri so stórum parti av fiskaframleiðsluni á landi, at talan er í veruleikanum um monopol. segði Dan Petersen.

Hann segði at veruleikin er tann, at virkini í Fiskavirking bjóða ikki ímóti hvørjum øðrum og sostatt er fyritøkan við til at halda prísinum niðri, tí Fiskavirking letur ein prís fyri fiskin, sum er lægri enn tann, sum aðrir lata.

Dan Petersen segði, at harumframt er tað at kalla bara Fiskavirking í Føroyum, sum tekur ímóti upsa, sum heilt nógv skip fiska.

– Men við síni monopolstøðu heldur fiskavirking prísinum niðri.

Og hann legði afturat, at hendir tað, at eitt skip fer uttanlands, at avreiða, gerst Fiskavirking firtin og kann finna uppá ikki at bjóða upp á lastina hjá hesum skipi næstu ferð, tað skal avreiða.

Dan Petersen segði, at hann hevði hoyrt í javnaðarflokkinum, at verður Fiskavirking privatiserað, verður stúrt fyri, at Eimskip keypir seg inn í tað fyri at tryggja sær flutningin og tað verður til óbótaligan skaða fyri Smyril Line.

– Eg haldi ikki, at javnaðarflokkurin skal hugsa so nógv um Smyril Line, tí tað byggir á handilsligar treytir og tað kendi treytirnar, tá ið tað bygdu Norrønu.

– Og tað er rættiliga illa dámt ímillum fiskimenn, at teir skulu betala prísin fyri at varðveita Norrønu í flotanum.



# Stúra fyri útlendskum kapitali í føroysku fiskvinnuni

**– Javnaðarflokkurin stúrir fyri útlendskari innrás í føroysku fiskivinnuni á landi. Men tað merkir ikki, at tað ikki kann vera skilagott at privatisera Fiskavirking, sigur Jóannes Eidesgaard**

LANDSFUNDUR
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Støðan hjá javnaðarflokkinum til privatisering, hevur onki við Norrønu at gera. Tað stingur nógv djúpri enn so, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í javnaðarflokkinum*

– Lata vit dyrnar upp fyri, at útlendskur kapitalur ótálmaður kann seta seg á okkara høvuðsvinnu, er tað eitt afturstig fyri okkum.

Á landsfundi í javnaðarflokkinum hetta vikuskiftið gjørdi Jóannes Eidesgaard, floksformaður gjørdi greitt, at Smyril Line hevði ógvuliga lítið við sjónarmiðið hjá flokkinum um at privatisera fiskavirking at gera, soleiðis sum Dan Petersen rør framundir í grein aðrastaðni í blaðnum

– Tað er ein ótrúliga lítil brikkur í hesum spæli, tí tey atlitini vit taka, eru av heilt øðrum, prinsipiellum slagi.

Formaðurin í javnaðarflokkinum er samdur við Atla Dam um, at fortreytin fyri einum føroyskum virðisbrævamarknaði er, at tær almennu fyritøkurnar verða lýstar til sølu.

– Annars er als onki grundarlag fyri virðisbrævamarknaðinum, legði hann afturat.

Jóannes Eidesgaard tvíhelt um sjónarmiðið, at fiskurin, sum svimur á grunnunum, er fólksins ogn.

Men hann dugdi ikki at síggja nakað rímiligt í, at vit skulu føra fiskin til lands, men at tað síðani skulu vera útlendskar fyritøkur, sum taka sær av at virðisøkja hann, tí tað kunnu einsvæl verða útlendingar, sum fara avstað við Fiskavirking, verður hon privatiserað.

### Eitt afturstig

– Lata vit dyrnar upp fyri, at útlendskur kapitalur ótálmaður kann seta seg á okkara høvuðsvinnu, er tað eitt afturstig fyri okkum.

Jòannes Eidesgaard vísti á, at bæði hvat alivinnuni og skipaflotanum viðvíkur, hava vit sett sum mark, at útlendingar kunnu í mesta lagi eiga ein triðing.

– Hví skulu vit so lata útlendskan kapital fáa ótálmað rættindi á okkara høvuðsvinnu á landi, sum skal virðisøkja okkara fiskatilfeingi.

Hann helt, at serliga álvarsligt er hetta, tá ið hugsað verður um, hvussu viðbrekin vit eru við tað, at vit eru so smá, at tað er fyri lítið at rokna hjá eini útlendskari fyritøku at keypa alla okkara fiskivinnu á landi.

Ein annar vansi við óumhugsaðari privatisering er, at virkini verða miðsavnað á einum staði.

– Og eg haldi, at tað er undrunarvert at halda, at politikarar í Føroyum ikki vilja hava eitt orð at siga í okkara høvuðsvinnu.

Formaður javnaðarfloksins segði, at hendi tað, at norðmenn keypa okkara fiskavirki á landi, fara teir uttan nakran iva at reka virkini í Føroyum so at tað tænir vinnuni í Noregi best.

– Tað merkir, at loysir tað seg at skrúva blussið fyri í Føroyum fyri at tæna teirra áhugamálum í Noregi, gera teir tað uttan iva.

Jóannes Eidesgaard legí dent á, at fyri tað um javnaðarflokkurin stúrir fyri útlendskum kapitali í flakavinnuni, er tað ikki tað sama sum at vera ímóti at Fiskavirking verður privatiserað.

– Men tað hevur als ongan skund at privatiserað Fiskavirking, tí vit hava tíðina fyri okkum.

– Men hvørjir eru so teir føroyingarnir, sum kunnu hugsast at keypa Fiskavirking, spurdi floksformaðurin.

– Tað eru júst teir somu, sum róku fiskavirkini, tá ið tey fóru á húsagang fyri 10-12 árum síðani.

Ogh ann helt, at orsøkin til at tjóðveldisflokkurin tók undir við privatiseringini, var ikki av hugsjónarligum slagi, men tí at flokkurin helt, at hetta kundi fíggja ein part av fullveldinum.

Annars róðu formaðurin í javnaðarflokkinum framundir, at kundi politikkurin verið bendur tann vegin, at inntækurnar av at selja ávísar, almennar ognir, blivu brúktar til at fíggja útbyggingar í samfelagnum við, átti javnaðarflokkurin ikki at verið so avvísandi.

### Onki galið

Kristian Magnussen, løgtingsmaður, var als ikki samdur við teimum, sum hildu, at Fiskavirking skuldi privatiserast nú.

Hann helt, at tað kundi aldrin vera so, at tað í grundregluni er galið, at vit eiga eina fyritøku í felag.

– Føroya Fólk hevur ikki biðið um Fiskavirking. Men Føroya Fólk fekk rokningina fyri kreppuna í samfelagnum, bæði kreppuna í fiskivinnuni og kreppuna í fíggjarheiminum.

Hann helt, at í stórum hevði Fiskavirking megnað uppgávuna væl og hann var vísur í, at var tann risin, sum eitur Fiskavirking á privatum hondum, høvdu teir verið nógv meiri harðrendur ímóti fiskimanninum enn Fiskavirking nú er.

– So fyri mær kann Føroya Fólk eiga Fiskavirking í allar ævir - bara tað verður rikið ordiligt.

Bjarki Mohr, formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, helt, at javnaðarflokkurin hevur ongantíð verið talsmaður fyri, at tað almenna skal eiga so stóran part av vinnulívinum, sum tað ger í Føroyum við Fiskavirking, Føroya Banka, Atlantsflog og øðrum.

– Tvørturímóti hevur javnaðarflokkurin sagt, at har tað privata ikki røkkur, skal tað almenna taka um endan.

Hann helt, at flokkurin eigur at gera sær greitt, og at gera fólki greitt, hvat hann heldur, eigur at vera á privatum hondum og, hvat eigur at vera á almennum hondum.

Kortini var hann samdur um, at privatiseringarnar høvdu ongan skund.

– Tær skulu vera ómetaliga væl umhugsaðar, tí tær skulu koma samfelagnum til góðar.

Hinvegin helt hann ikki, at javnaðarflokkurin eigur at ræðast privatiseringar.

– Men tað, sum samgongan ger í løtuni, er at gera ein virðisbrævamarknað, sum ikki er annað enn ein internet portalur í Íslandi.

– Tann, sum heldur, at ein virðisbrævamarknaður er ein fortreyt fyri privatiseringum, mistekur seg, tí fyri at keypa og selja eina ogn, krevst bara ein seljari og ein keypari, sum eru samdir. Tað er púra óneyðugt við einum virðisbrævamarknaði.

Hann vísti eisini á, at ein virðisbrævamarknaður hevur avgjørt sínar vansar, tí Pan Fish er eitt talandi dømi um, hvussu stórt fallið kann vera, tá ið tað skrædnar og virðið fer í botn eftir einari nátt.

– Virðið, sum ein fyritøka hevur á einum virðisbrævamarknaði er nevniliga ikki veruligt, tí tað er bara ásett á eitt pappír, har fortreytirnar eru heilt øðrvísi.

Eisini Henrik Old, Løgtingsmaður, helt, at flokkurin eigur at skilja ímillum, hvat eigur at vera privat og hvat eigur at verða alment.

Eitt nú spurdi hann um tíðin kanska er farin frá Húsalánsgrunninum, sum ikki hevur so nógv lán eftir.



*Føroya Fólk hevur ikki biðið um at fáa Fiskavirking og í grundregluni er onki galið í, at vit eiga eina fyritøku í felag, sigur Kristian Magnussen*



*Javnaðarflokkurin hevur ongantíð verið talsmaður fyri, at tað almenna skal eiga tað mesta av vinnulívinum, segði Bjarki Mohr, formaður í Suðurstreymoyar javnaðarfelag*